**Skjal 3**

**Reglgerð fyri sniðgóðkenning av rundum liggjandi tangum til eldfiman løg o.a.**

## 1. <u>Alment.</u>

Kunngerðin um eldfiman løg § 10 ásetur, at liggjandi rundir tangar skulu sniðgóðkennast av Brunaumsjón landsins.

## 2. <u>Umsóknir.</u>

2.1. Umsókn um sniðgóðkenning skal sendast Brunaumsjón landsins.

2.2. Umsókn, neyðugar tekningar og frágreiðing skal sendast í 3. eintøkum.

2.3. Tá tangastaður verður bygdur ella settur á stovn, skal eitt eintak av váttanini fyri sniðgóðkenningini sambært serfyriskipan fyri eldfiman løg, punkt 1.3.5, sendast brunamyndugleikunum.

2.4. Einans er loyvt at selja og nýta tangar, ið rúma minni enn 100.000 litrar og sum eru sniðgóðkendir av Brunaumsjón landsins sambært skjølum I, II, III og IV til "Miljøministeriets Bekentgørelse nr. 386 frá 21. august 1980" um eftirlit við goymslu av eldfimum løgi o.t.

2.4.1. Heimildirnar, sum "Prøveudvalget" hevur eftir omanfyri nevndu skjølum, eru lagdar til Brunaumsjón landsins.

**2.5. <u>Tangaframleiðari skal søkja um sniðgóðkenning til at byggja tangar.</u>**

2.5.1. Hann, ið flytir inn tangar, skal søkja Brunaumsjón landsins um loyvi. Allar ásetingar, sum eru galdandi fyri tangar, gjørdir í Føroyum, eru eisini galdandi fyri tangar, ið verða innfluttir, uttan so at aðrar ásetingar eru, sum beinleiðis fyriseta annað.

2.5.2. Í sambandi við viðgerð av umsókn, kann Brunaumsjón landsins krevja, at tangi verður kannaður av góðkendari royndarstovu fyri rokning umsøkjarans.

2.5.3. Fyri viðgerð av umsóknum skal latast gjald eftir nærri ásetingum frá landsstýrinum.

2.5.4. Ein góðkenning er bert galdandi fyri slagið av tí ávísa tanganum, sum tann ávísi persónurin hevur fingið sniðgóðkennig til at byggja (flyta inn). Brunaumsjón landsins kann í samstarvi við Arbeiðseftirlitið gera nærri ásetingar fyri góðkenning og eftirlit við framleiðslu og gjaldi fyri hetta. Landsstýrið skal góðkenna tílíkar ásetingar.

2.5.5. Brunaumsjón landsins ella annar, ið brunaumsjónin gevur tílíka heimild, kann uttan fráboðan vitja á framleiðslustaði at hava eftirlit við, um tangar verða gjørdir í samsvari við sniðgóðkenningina.

2.5.6. Hann, ið hevur fingið sniðgóðkenningina, hevur ábyrgdina av at tangar, við atliti til konstruktión, tilfari og framleiðslu eru í fullum samsvari við sniðgóðkenningina - og at tær ásetingar og treytir, ið eru knýttar at sniðgóðkenningini, verða hildnar.

2.5.7. Metir Brunaumsjón landsins, at tangi verður ikki gjørdur í fullum samsvari við ásetingarnar, kann sniðgóðkenningin verða tikin aftur á staðnum.

## 3. <u>Gildisøki fyri reglugerðina.</u>

3.1. Reglurnar fevna um tangar at grava niður og tangar, settir oman á jørð, til goymslu av eldfimum løgi í flokki I, II og III umframt fasta útgerð til flutning av tílíkum evnum eftir longri strekkjum (rørleiðing yvir og undir jørð).

3.2. Reglurnar eru eisini galdandi fyri tangar inni, til goymslu av eldfimum løgi, eins og nevnt í 3.1., og tilhoyrandi leiðingar og útgerð.

**4. <u>Merki og váttan.</u>**

4.1. Allir tangar skulu vera útgjørdir við skilligum, haldgóðum og tæringarføstum skeltum, við upplýsingum um navn og bústað hjá framleiðaranum, tangarúmd, framleiðslunummar, ár og sniðgóðkenningarnummar.

Tilhoyrandi áfyllingartútur skal eisini vera merktur við somu upplýsingum umframt lýsing um tangaslag og tvørmát á tanganum. Upplýsingar um tangaslag og tvørmát er bert galdandi fyri tangar, ið skulu liggja undir jørð.

4.1.1. Tá tangar verða útflýggjaðir, skal fylgja við teimum ein váttan í 3. eintøkum við upplýsingum um tangar, hvussu teir skulu handfarast og leggjast o.a. Váttanin skal eisini lýsa navn og bústað hjá framleiðaranum, tangarúmd, framleiðslunummar, ár, sniðgóðkenningarnummar, tangaslag og tvørmát.

4.1.2. Í teimum førum serligar treytir eru knýttar at sniðgóðkenningini fyri niðurgrivnar tangar ella í sambandi t.d. við, at tangar verða niðurbundnir (ankraðir), - skulu tær treytirnar í fullum orðaljóði verða tilskilaðar í váttanini, sum er nevnd í punkt 4.1.1.

4.1.3. Verður ein sniðgóðkendur tangi grivin upp úr jørðini, og ætlanin er at leggja hann niður aftur, skal kannast eftir, um neyðugt er við umvælingum. Umvælingar o.t. skulu vera gjørdar hjá framleiðara, sum hevur tílíka sniðgóðkenning. Skrivast skal nýggj váttan fyri tangan, eftir at umvælingin er gjørd.

4.1.4. Upplýsingar og váttanir, eins og tær í punktunum 4.1.1. - 4.1.3 nevndu, skulu útfyllast av tí fólki, sum hevur sniðgóðkenningina. Upplýsingar og váttanir um tangar, gjørdir í útlondum, skulu umframt upplýsingarnar, kravdir í 4.1.1. - 4.1.3., eisini siga frá navni hjá bæði framleiðaranum og innflytaranum.